# Atlantic er klárt til summarið

»Stuttligari og lættari!« Soleiðis ljóðar slagorðið, nú Atlantic Airways hevur riggað til summarflúgvingina, sum í ár er meira umfatandi, enn hon nakran tíð áður hevur verið.

Magni Arge, stjóri, slær eisini fast, at hetta er ein tørvur, sum heilt náttúrligt býr í føroyinginum.

– Tá summarið er gott, so er tað jú ótrúliga vakurt her hjá okkum. Men vanliga vil tað vera so, at vit øll hava tørv á at sleppa burtur úr hesum regninum av og á. Og tað er jú ongantíð betri í Føroyum, enn tá tú kemur aftur úr útlondum, tekur stjórin til.

### Fjølbroytni

Magni leggur dent á, at felagið í ár hevur lagt nógv fyri, soleiðis at ferðaætlanin er so fjølbroytt og ódýr, sum tað á nakran hátt ber til. Og hann dylur ikki fyri, at tað er við eitt sindur av stoltleika, at tey hava ment rutunetið til at vera somikið umfatandi, sum tað nú er.

– Vit flúgva fimm ferðir um vikuna til Íslands. Tvær ferðir av hesum er møguleiki fyri víðari flúgvin til Grønlands, og hartil koma jú góðu møguleikarnir, sum Icelandair gevur ferðafólkum at koma til USA fyri ein bíligan penga.

– Flúgvingin til Stanstead í London er vorðin alt meira vælumtókt. Vit flúgva tvær ferðir um vikuna á hesi rutu, og ert tú fyrst í London, so eru møguleikarnir nógvir. Bæði fyri ferðing í enska høvuðsstaðnum, men so sanniliga til at ferðast víðari. Ikki minst tí feløg sum Ryan Air og Easy Jet hava nakrar ferðir, sum eru ófatuliga bíligar.

– Og hartil koma meira føstu ferðamálini hjá okkum. Billund er á skránni níggju ferðir hvørja viku. Aalborg, Edinburgh, Oslo og Stavanger standa somuleiðis á kortinum. Og so sjálvandi eisini Keypmannahavn. Tað er so framvegis tann rutan, har vit flyta flestu ferðafólkini, og soleiðis verður helst eisini rúma tíð afturat, staðfestir Magni Arge.



*Við seks flogførum í flotanum kann Atlantic Airways borðreiða við einum fjølbroytni, sum føroyski kundi ongan tíð áður hevur upplivað*




















